## A-influensan kann ikki steðgast

-Boðskapurin frá serfrøðini er, at tað ber ikki til at steðga A-influensuni. Tað segði stjórin í WHO, Margaret Chan, á einari ráðstevnu í Meksiko, har serfrøðingar og leiðandi fólk á heilsuøkinum tosa um A-influensuna. Margaret Chan segði, at sjúkan er lutfalsliga veik, men at hon breiðir seg støðugt skjótari. Tað seinna elvir til stúran, tí tað kann hava við sær, at nógv liggja sjúk við hús, og tað fer at ávirka fíggjarstøðuna hjá arbeiðsplássunum. Á ráðstevnuni í Meksiko hevur bretski heilsumálaráðharrin sagt, at heilsumyndugleikarnir har vænta umleið 100.000 nýggjar tilburðir av A-influensu um dagin seinni í summar.

## Gentur seldar til ættleiðing

Tey seinnu árini eru minst 80 gentur í kinesiska landspartinum Guizhou tikin frá foreldrunum og seld fólki í USA og Evropa sum ættleidd børn. Tað skrivar eitt alment blað í Kina í dag. Prísurin fyri hvørt barnið hevur verið 16.000 krónur, og teir pengarnir eru so býttir millum myndugleikarnar og tey barnaheimini, sum genturnar hava verið á, til tey nýggju foreldrini eru komin eftir teimum. Kinesiska blaðið vísir á, at 16.000 krónur er júst tað, sum eini kinesisk foreldur skulu gjalda fyri at fáa undantaksloyvi til at hava tvey børn. Tey, sum so ikki hava havt ráð til at gjalda, hava mist børnini, sum síðani eru seld av landinum sum ættleidd børn, skrivar blaðið.



# Menna mentanina í miðbýnum

**Við keypinum av ognunum Niels Finsensgøta 7 hevur Tórshavnar kommuna tikið eitt stórt stig á leiðini at menna mentanina í miðbýnum.
– Løtan tóktist hin rætta, og keypið er útreiðsluneutralt fyri kommununa, sigur Bogi Andreasen, varaborgarstjóri**

MENTAN
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Bogi Andreasen hevur í mong ár arbeitt fyri mentanini í Havn, og nú hann er valdur í býráðið, eru møguleikarnir næstan óavmarkaðir.

- Ja, eg brenni fyri mentanini og havi altíð gjørt tað. Eg havi arbeitt her á Margarinfabrikkini í eini 5-6 ár, og mínar royndir siga mær, at alt ber til, bara mann er positivur, sigur Bogi Andreasen.

Og í so máta hevur hann alt gott at bera umsitingini.

- Hon hevur altíð verið sera fyrikomandi og positiv, sigur Bogi Andreasen.

Hann heldur sjálvur, at hann dugir at síggja møguleikar í næstan øllum, og hann heldur, at miðbýurin í Havn er »genialur« til mentanarlig tiltøk.

- Tá Joto 7 og Suðuroyar Sparikassi fluttu út úr hølunum í Niels Finsensgøtu 7, læt møguleikin seg upp, at gagnnýta hølini til fulnar í sambandi við býarbókasavnið.

Tað er jú soleiðis, at býráðið fekk bjóða hesar ognir fyri nøkrum árum síðani fyri 25 milliónir krónur. Nú stóð tað okkum í boði at ogna okkum bygningin fyri 17, og tá tað samstundis merkir, at keypið er kommununi útreiðsluneutralt, er hetta tann perfekta loysnin, sigur Bogi Andreasen.

Hann hevur sjálvandi gjørt sær sínar tankar um, hvussu hølini kunnu brúkast á besta hátt.

- Simme er jú ein institutión í býnum, so sjálvandi skal hann hava loyvi at verða verandi. Samstundis vil hann fegin flyta út til vegin og tað merkir, at vit kunnu nýta tey hølini til eitt nú internetcafé. So kunnu hini hølini út móti vegnum nýtast til hugnahøli, har fólk til dømis kunnu koma inn at lesa bløðini, sigur Bogi Andreasen.

### Lív í miðbýin

Varaborgarstjórin hevur tankar um at draga Eik Banka inn í konseptið við at lata upp fyri bakgarðinum har standmyndin er, so tað økið kann virka sum eitt spæli- og rekreatiónsøki hjá børnum og vaksnum.

- Hugskotið er í veruleikanum ikki tikið úr leysari luft. Tað fekk eg úr einari bók hjá soninum, meðan eg læs fyri honum í seingini. Í bókini var eitt mentanarhús, har alt bar til. Eg ímyndi mær, at eini foreldur kunnu sita inni í lesihølunum og lesa dagbløðini, samstundis sum tey eygleiða børn síni spæla hinumegin vegin, sigur Bogi Andreasen.

Á gøtuhædd kann so eisini verða eitt barnabókasavn. Men hetta skal so alt gerast í samráð við leiðsluna á býarbókasavninum, leggur varaborgarstjórin dent á.

- Tað er so javnan, at barnagarðsflokkar ella smáir skúlaflokkar vitja, og so mugu tey trampandi allan vegin upp gjøgnum trappurnar, sigur Bogi Andreasen.

Samstundis skal holið inn til Simma takast við í hølini, so tá tú kemur inn gjøgnum gamla gloppið, er tú inni í býarbókasavninum.

Varaborgarstjórin metir, at tað hevði verið gott fyri miðbýin, at skapt hesar karmar hjá býarbókasavninum.

- Tú hevði fingið meiri lív í miðbýin og býarbókasavnið á tann hátt, men tú hevði samstundis eisini fingið eina rúgvu av ymsum fólki at ferðast í tí fakliga umhvørvinum, sum eitt bókasavn jú er, sigur Bogi Andreasen.

Hann hevur eisini tankar, sum røkka eitt sindur longi enn hetta.

- Vit kunnu jú ikki reka vinnuligt virksemi so sum handlar, men vit kunnu stuðla undir at samantvinna handil og mentan til gagns fyri báðar partar. Tað átti at verið so, at niðaru hæddirnar á bygningunum í miðbýnum vórðu nýttar til handilsligt endamál, meðan tær ovaru vórðu nýttar til bústaðir. Á tann hátt tryggjar tú, at tað er lív í miðbýnum alt døgnið, sigur Bogi Andreasen.

### Mentanarhøvuðsstaður

Eitt annað, sum arbeitt verður fram ímóti í sambandi við miðbýin og gongugøtuna er, at strekkið frá gosbrunninum á Glade Hjørn og oman til gamla kommunuskúlagarðin, verður bannað fyri bilferðslu.

- Hetta er tó nakað, sum ikki verður gjørt, fyrr enn tíðin er búgvin, undirstrikar Bogi Andreasen.

Allar avgerðir eru bygdar á undanfarnar avgerðir, og varaborgarstjórin dylur ikki fyri, at tað er undanfarna býráði fyri at takka, at komið er so langt á leið, sum tað er.

- Eisini sitandi býráð er sera positivt sinnað mótvegis mentanini, og alt letur seg gera, um bara skil er í, sigur Bogi Andreasen.

Hann sigur, at kommunan ræður yvir rættiliga nógvum bygningum, men orsøkin til tað er, at føryska veðrið er so skiftandi og vátt.

- Tað ber illa til at fyrireika nakað uttandura tiltak í Føroyum, og tí er neyðugt við so nógvum hølum, sigur Bogi Andreasen.

Líka síðani Heðin Mortensen gjørdist borgarstjóri fyri hálvum fimta ári síðani, hevur hann tosað um Tórsgøtu sum mentanargøtu, og nú liggja gamla Meiaríið, Margarinfabrikkin, Reinsaríið, skjótt Perlan og so Miðlahúsið rað á rað omaneftir, við Vágsbotni um at gerast ein mentanarblettur við standmyndini av Nólsoyar Páll, fiskatorginum og skjótt tveimum pubbum á veg út í gamla Tinganes.

- Sum eg síggi tað hevur Tórshavn møguleika at gerast – og er kanska longu – mentanarhøvuðsstaðurin í Norðuratlantshavi, sigur Bogi Andeasen.

Hann fegnast um evnini, sum bæði land og kommunur hava havt, at varðveita gamlar bygningar. Samstundis fegnast hann um, at her-og-nú ætlanin um at fylla øll hølini í miðbýnum er rokkin.

- Vit eru seinkaðir nakað við ætlanunum við Perluni, annars hevði tann bygningurin verið tikin í nýtslu til ólavsøku. Nú verður tað síðst í august. Men eitt er bygningar og karmar, kunsturin er at fáa alt at virka, og at samantvinna handilslív og mentan, sigur Bogi Andreasen.

Fyribils hevur kommunan so tikið enn eitt stig á leiðini at menna mentanina í miðbýnum.




*Bogi Andreasen fegnast um, at kommunan hevur keypt ognina Niels Finsensgøta 7. Bygningurin er í fýra hæddum omanfyri jørð og einari undir. Føroya Banki fíggjar tær 17 milliónirnar, sum bygningurin kostar*
*Mynd: Jens Kristian Vang*